# Dansifrøi

18. juni 2020

Mentanarnevndin
Føroya Løgting

**Viðv. Løgtingsmáli nr. 148/2019: Uppskot til løgtingslóg um stuðul til listafólk, tónleikafestivalar og almannagagnligar felagsskapir í sambandi við COVID-19.**

Vit undirritaða felag vilja hervið loyva okkum at heita á mentanarnevndina at tryggja, at okkara felag eisini fær rætt til endurgjald fyri mista leiguinntøku frá tiltøkum, sum eru avlýst vegna koronasmittuna.

Dansifrøi er eitt áhugafelag við gott 300 limum, sum hvønn vetur skipar fyri undirvísing í m.a. standard dansi, linedansi og fólkadansi fyri vaksin og børn.

Felagið hevur bygt egið hús í Gundadali og fíggjar raksturin av dansiskeiðum og húsi við limagjaldi, luttøkugjaldi fyri dansiskeið og útleigan til ymisk tiltøk.

Dansifrøi fær ikki annan rakstrarstudning, er ikki limur í ÍSF, men hevur játtað skattafrælsi frá Taks smb. § 3,3 í skattalógini.

Virðiliga
Petur Petersen
Formaður í Dansifrøi